# Var eftir steypinum

**Liðskaparin hjá VB var ongan tíð inni á vøllinum, tá steypasigurin varð tryggjaður, men sjálvt tóktist Guðrun Midjord ikki hava nakað ímóti hesum**

STEYPAVINNARI
*Jákup Mør*

Tað var ein fegin Guðrun Midjord, sum vit fingu orðið á, tá steypasigurin var sodnaður nakað hjá VB-kvinnunum.

Spurd, hvussu hon kendi tað, nú tað eftir tvær nyttuleysar royndir loksins eydnaðist at vinna steypið heim, helt hon, at tað bara var ein heilt deilig kensla.

- Nú eri eg komin nakað yvir sjokkið, og tað er fantastiskt at vita, at vit megnaðu tað hesaferð. Har stóð nógv á, men tað gekk at enda.

Eitt, sum kanska var eitt sindur serstakt við finaluni, mundi vera, at liðskiparin hjá VB als ikki var við á vøllinum. Yvir høvur gjørdi VB óvanliag fáar útskiftingar, men tá vit spurdu Guðruna um hetta, var hon skjót at siga, at tað hevði hon so einki ímóti.

- Eg skal siga akkurát, sum er, so vildi eg helst sleppa frá at fara inn á vøllin. Hatta gjørdist alt ov spennandi. Eg hevði steindoy, um eg skuldi inn á vøllin hasa seinastu løtuna, so bæði eg og Mary sótu sum klistraðar at stólinum.

- Vit hava jú so ofta mist takið á dystum í líknandi støðum, og tá munurin var komin niður á tvey mál, ivaðist eg ikki í, at nú glapp tað aftur, men tíbetur helt leiðslan sær hesaferð.

### Langt eftir á mál

Sum støðan er í løtuni, so er einki at ivast í, at VB nú má roknast sum favorittar til FM. Tær hava leikt ein dyst færri enn VÍF, hava tvey stig fleiri, og ikki minst hava tær nú tríggjar av fýra ferðum bast teimum gulu.

Sjálvt er Guðrun tó ikki so nógv fyri at rópa VB fyri favorittar.

- Vit liggja væl fyri í løtuni, og um væl vil til, so kunnu vit vinna FM. Men har er langt eftir á mál. Longu komandi vikuskifti hava vit truplan útidyst dyst móti Kyndli, og vit skulu eisini til Vestmanna, so enn ført tú so ikki meg at siga nakað sum helst um ta, sigur Guðrun at enda.



# Straffi

**Bent Djurhuus var ikki í iva um, at hann átti brotskast fram móti dystarenda, men hóast hetta, so helt hann, at hann og liðfelagarnir bert kundu takka sær sjálvum fyri, at talan ikki gjørdist um triðja steypasigurin á rað**

SILVURMERKIÐ
*Jákup Mørk*



Tað var ein vónbrotin Bent Djurhuss, sum Sosialurin fekk fatur á eftir finaludystin. Sjey sekdun fyri leiklok var hann einsamallur ávegis Kyndils-málinum, og sjálvur ivaðist hann ikki, at talan var um brotskast.

- Tað er so einki at ivast í. Maðurin kemur aftan ífrá og skræðir meg niður. Eg fái gott nokk skotið, men eg eri fullkomuliga úti av balansu, so her er einki at ivast í.

### Sjálvir skuldina

Hóast keðiligu støðuna við dytarlok, so helt Bent tó ikki, at nøkur orsøk var at geva dómarunum ábyrgdina fyri, at dysturin varð taptur.

- Nei, tað kann mann ikki siga. Sjálvandi kenni eg meg snýttan í hasum førinum, men hinvegin er so nógv annað, sum vit gera galið, og tá nyttar tað einki at flyta ábyrgdina aðra staðni. Hatta er tó ein støða, sum íkemur minni enn 10 sekund fyri leiklok, so tað er náttúrligt, at fokus verður sett á akkurát hasa støðuna.

### FM er eftir

Fýra tey seinastu árini er tríggjar ferðir hent, at tapararnir í steypafinaluni hava vunnið FM-heitið. Tá vit nevna hetta fyri Bent, er hann skjótur av svara, at í so máta var tapið kanska ikki so galið.

- Nú hava vit í øllum førum bara eitt at hugsa um, og vit liggja eisini hampuliga væl fyri. Nú mugu vit tó fyrst og fremst fáa hetta vónbrotið úr høvdinum, og longu mikudagin hava vit dyst móti H71, so tað eru ikki ráð at hanga við høvdinum. Men í dag er tað í øllum førum hart, segði Bent Djurhuus at enda.

# Nú er liðugt

**Jónleif Sólsker kundi endaliga boða frá, at nú er liðugt við fyrstu deildarhondbólti**

STEYPAVINNARI
*Jákup Mørk*

Nógvir av áskoðarunum mundu vera heldur bilsnir, tá tað undan finaludystinum var greitt, at Jónleif Sólsker var partur av liðnum hjá Kyndli. Royndi spælskiparin hevur annars als ikki verið við á liðnum síðani jólasteðgin, og tað ljóðaði annars, at hann var givin á besta liðnum, men hann fekk so ein seinasta møguleika, sum hann tók av.

- Nú er liðugt. Eg var sum so givin longu undan hesum, men tá eg fekk møguleikan at vera við í finaludystinum, so tók eg av. Tað var ein kjansur, sum eg ikki vildi lata fara.

Eitt er ein steypafinala. Men hvat um Kyndil skal spæla ein avgerandi dyst í FM-stríðnum um tveir mánaðir. Kundi tú so eisini hugsað tær at rætt eina hjálpandi hond?

- Nei. Nú er liðugt. Og so kann eg leggja afturat, at megna teir at koma í eina støðu, har talan verður um avgerandi dyst um tveir mánaðir, so klára teir nokk eisini at spæla tann dystin uttan meg.

Nú hann gevst á besta Kyndils-liðnum er einki at ivast í, at Jónleif framyvir fer at fáa nakað betri stundir til familjuna, men hóast hetta, so ætlar hann sær ikki heilt at gevast við hondbóltinum.

- Vit hava jú eisini aðru deild, og har rokni eg við, at eg fara at spæla framyvir. Har venja vit bara einar tvær ferðir um vikuna og spæla dyst, so tað man nokk fara at ganga.

Einasti spurningurin í so máta man helst vera, hvar Jónleif fer at spæla á næst besta liðnum. Í steypafinaluni slapp hann í øllum førum eisini at royna seg sum strikuspælari eitt lítið skifti, men hetta roknaði hann tó ikki við, skuldi vera nakað varandi stað.

- Wislander hevur altíð verið mín stóra fyrimynd, og hann endaði so strikuspælari, eftir at hann annars var spælskipari, so hvør veit. Neit tað verður nokk ikki har, at tit koma at síggja meg. Eg havi bara ætlanir um at halda fram sum miðspælari, sigur hann flennandi at enda.



*Hvussu fegin tey enn eru um gullmerkini hjá Jónleif, so munnu Karin og Jógvan helst gleðast um, at Jónleif helst fer at fáa betri stundir til heimið framyvir. Umframt tey bæði telur húskið eisini Andreas, sum ikki er við á myndini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Vilji og verja

**Hans Áki Dal-Christiansen helt, at burtur sæð frá stórspælið frá Jóhan Danielsen, so vótu tað viljin og verjan, sum tryggjaðu Kyndli steypasigurin**

STEYPAVINNAR
*Jákup Mørk*



Tá Hans Áki Dal-Christiansen í sættu royndini misnýtti brotskast leygardagin, mundu mong av kyndilsviðhaldsfólkunum steðga at anda eina løtu. Støðan var tá 26-25, og við einum minutti eftir er einki at ivast í, at eitt mál tá vildi avgjørt dystin.

Eftir dystin spurdu vit Hans Áka, hvørjir tankar runnu ígjøgnum høvdið, tá hann sá, at málverjin bjargaði brotskastinum, og hann var rættiliga kontantur, tá svarið kom.

- Fuck. Tað var tað, sum eg hugsaði. Eg veit ikki um óttaðist tí, men sjálvandi visti eg, at hetta kundi kosta okkum dystin, og tað var so einki serligt, helt hann.

Stutt undan hesum hevði Hans Áki sent sítt fimta brotskast í dystinum í netið eftir eina støðu, har tað mest sum tóktist, at eingin vildi taka sær av brotskastinum. Leingi lá bólturi stillur á sjey-metra strikuna, eftir at Hans Áki hevði biðið onkran annan taka hesaferð, men endin gjørdist so, at Hans Áki skeyt sjálvur.

- Eg vil ikki siga, at eingin vildi taka. Tað er meira so, at tá tú hevur skotið fleiri brotskøst á rað, so er vandi fyri, at málverjin lúrir teg av, og tað var helst eisini tað, sum hendi við hasum seinsta skotinum.

### Viljin og Jóhan

Tíbetur fyri Kyndil, so var misnýtta brotskastið

*- Tá tú hevur skotið fleiri brotskøst á rað, so er vandi fyri, at málverjin lúrir teg av, og tað var helst tað, sum hendi, helt Hans Áki um misnýtta brotskastið*

ókeypis. Hóast tað var nær við, so helt leiðslan hjá liðnum allan vegin, og saman við liðfeløgunum kundi Hans Áki fegnast um fyrsta steypasigurin í trý ár hjá felagnum.

Og hann var ikki í iva, tá vit at enda bóðu hann seta orð á, hvørjar orsøkir hann helt vóru tær týdningarmestu í sigrinum.

- Stríðsviljin og verjan. Tað er einki at ivast í. Vit trúðu alla tíðina uppá, at tað kundi bera til, og tað eydnaðist okkum í stóran mun at fanga stóru skjúttarnar hjá teimum. Og so var tað eisini Johan. Hann stóð ein fantastiskan dyst, og í dag hevur hann so uppiborið heitið sum mítt persónliga idol, segði ein ovurfegin Kyndils liðskipari at enda.

# Har var ikki nógv eftir

**Gurið Mortensen mátti eftir dystin ásanna, at har var ikki nógv eftir í VB seinastu løtuna, men nóg mikið var tað so undir øllum umstøðum**

STEYPAVINNARI
*Jákup Mørk*

Sæð burtur frá at lítli Pætur var eitt sindur bangin, tá hann stóð uppi á pallinum framman fyri hundrað tals fegnum vágbingum, so var ikki stórvegis ivi um, at hetta var ein góður dagur hjá Gurið Mortensen.

Fyri triðju ferð var hon partur av eini steypafinalu, og eftir at tær báðar fyrstu ferðirnar miseydnaðust, gekk alt loksins so, sum tað skuldi, tá VÍF var mótstøðuliðið leygardagin.

- Sjálv var eg bilsin av, hvussu væl tað gekk fyrstu løtuna. Har var alt akkurát, sum tað skuldi vera. Vit steðgaðu álopsspælinum hjá teimum, og fingu okkara egna álop at koyra, men tað kravdi eisini nógv. Seinasta partin av dystinum var snøgt sagt einki eftir í okkum. Eitt skifti hevði VÍF eisini heilt góðar møguleikar at taka okkum, men tíbetur misnýttu tær nakrar ferðirnar, samstundis sum vit skoraðu, soleiðis at vit fingu eitt sindur av luft, helt Gurið Mortensen, tá vit spurdu hana, hvussu hon upplivdi dystin.

### Okkurt mundi vera

Um restina av degnum annars helt Gurið, at fyrst og fremst, so skuldi hetta feirast.

- Nú veit ikki akkurát, hvussu tað verður, men sum eg havi skilt á lagnum, so eru nøkur fólk eftir har suðuri, og tey hava vist nokk gjørt eitt sindur av mati og soleiðis, segði ein fegin mamma at enda.

Og Pætur. Jú hann var róligur aftur, og tóktist ikki hava tað minsta ímóti at verða avmyndaður saman við parti av stóru hondbóltsfamiljuni í Vági.



*Lítli Pætur var eitt sindur bangin, tá øll rokanin á pallinum gekk fyri seg, men eina løtu seinni var alt gloymt, og hann hevði einki ímóti at vera partur av myndini, tá trý ættarlið skuldu avmyndast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Liðið fekk heiðurin

**Jóhan Danielsen vildi sum vant ikki gera stórvegis háva burtur úr egna avrikinum, men rósti heldur viðleikarunum fyri gott verjuspæl**

STEYPAVINNARI
*Jákup Mørk*

»Vit eru tú, vit eru tú« Orðini vóru ikki at fara skeivur av, tá Jóhan Danielsen kom inn í skiftirúmið hjá Kyndli eftir dystin. Hóast talan var um eitt satt liðavrik, so skerst ikki burtur, at framúrskarandi málmansavrikið var ein týðandi partur av hesum.

### Lítillátin

Í vanligum stíli, so var tað tó ikki egna persónin, sum Jóhan vildi leggja dent á eftir dystin.

- Eg skal ikki siga, at tað ikki gekk væl, men tað er so ikki bara mær fyri at takka. Verjan spældi ein ótrúliga góðan dyst, og tá er tað munandi lættari hjá málverjanum at standa væl, helt hann, tá vit ynsktu honum tillukku við avrikinum.

Fyri tveimum árum síðani var Jóhan annars stóra hetjan hjá strandingum, tá teir vunnu finaludystin á VÍF, men sjálvur helt hann tó ikki, at hesin dysturin var so øðrvísi enn so nógvir aðrir. Heldur ikki hóast talan var um dyst móti fyrrverandi liðfeløgunum.

- Sjálvandi ert tú kanska eyka spentur til ein slíkan dyst, men hann er tó ikki so øgiliga ymiskur í mun til so nógvar aðrar. Tað er meira tað, at tá tú sum málverji ført eina góða byrjan, og verjan annars riggar væl, so kemur tú rætt inn í dystin, og so verður alt líka sum lættari.

Og tað at hann kanska hevði ein fyrimun við at spæla móti fyrrverandi liðfeløgunum, helt Jóhan ikki hevði nakran sum helst týdning.

- Nei, tað kundi eins væl verið ein dystur móti VÍF ella Tjaldri ella onkrum heilt triðja. Mótstøðuliðið hevur ongan týdning í so máta. Kanska er tað heldur øvugt, soleiðis at strandingarnir hava ein fyrimun, tá teir spæla móti okkum, tí teir kenna meg somikið væl, helt Johan.

Og at teir framvegis bæði kennast og eru væl, er helst einki at ivast í. Tá vit tosaðu við málverjan, hevði hann júst verið inni í skiftirúminum og heilsað upp á fyrverandi liðfelagarnar, sum nú høvdu tapt finaludyst. Einamest tí Jóhan stóð somikið væl.

- Sjálvandi vóru teir vónbrotnir. Tað eiga teir at vera, men hinvegin ivist eg ikki í, at eg eri vælkomin innaftur, um tað skuldi verið, segði ein fegin steypavinnari at enda.



*- Tá tú sum málverji ført eina góða byrjan, og verjan annars riggar væl, so kemur tú rætt inn í dystin, helt lítillætni Kyndils-málverjin eftir dystin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*